gult26 cyan26 magenta26 svart26



# Nýggi Teistin ein veldug broyting

**– Tað gekk uppá stás at koma inn í havnina og til bryggju í Skopun. Har var eingin trulleiki sigur Eyðun Holm, sum var á brúnni, tá nýggi Teistin, Sandoyarskipið, fyri fyrstu ferð legði at bryggju í Skopun leygardagin. Hóast veðrið var sera gott henda dagin, sær hann tó ikki fyri sær trupulleikar, tá teir fara í rutu í næstum**

SAMFERÐSLA
*Jan Müller*




*Nýggi Teistin her fyrstu ferð við bryggju í Skopun leygardagin*

*Mynd Jan Müller*

Leygardagurin 21. apríl var ein stórur dagur hjá sandoyarfólki, hestfólki, kolturfólki og skúvoyingum. Henda dagin legði nýggja og stásiliga strandfaraskipið Teistin at bryggjuni í Skopun fyri fyrstu ferð. Hóast skipið ikki kemur í fasta rutusigling fyrr enn um eina tíð, nú ávís viðurskifti skulu fáast uppá pláss, so varð rættiliga nógv gjørt burtur úr henda søguliga dag. Nógv fólk hevði leitað sær oman á bryggjuna at hoyra Bjarna Djurholm, landsstýrismann fagna nýggja farinum og eisini Gerhard Lognberg, býráðsformann í Skopun. Sangkórið í Skopun var so eisini við til at gera løtuna hugnaliga. Eftir samkomuna kundi oyggjafólkið fara umborð at síggja nýggja skip teirra.

Tá Teistin legði at frammanfyri flakavirkið seinnapartin leygardagin vórðu tað fleiri skopuningar, sum hildu fyri, at skipið var í so høgt. Men tað sigur skiparin er eingin trupulleiki. –Hetta er eitt so mikið gott far, tað er so effektivt og kraftin er so góð, at hetta verður ikki nakar trupulleiki. Eyðun Holm sigur, at tá man er komin í venjing við at brúka skipið eisini í ringum veðri, átti tað heldur ikki verið nakar trupulleiki at siglt skipið inn og úr havnini í Skopun.

Og tað er sanniliga munur á at standa á brúnni á Teistanum 21. apríl 2001 samanborið við at standa við róðurið á gamla Sildberanum 11. januar 1967, tá Eyðun Holm fyri fyrstu ferð fekk ábyrgdina av at flyta fólk millum Havnina og Skopun. Nýggi Teistin er eitt stásiligt far í allar mátar og livir upp til tey nútíðar krøv, sum sett verða einum strandfaraskipi sum hesum.

## Longst á brúnni

Eyðun Holm man vera ein tann á brúnni á strandfaraskipunum, sum hevur verið longst í arbeiði hjá SL. Hann byrjaði sum feriuavloysari á gamla Smyrli í 1966. Fór so umborð á Sildberan árið eftir. Eftir tað hevur hann ført fleiri skip: gamla Bragd, Pride, Rituna, Dúgvuna og Trónd. Siglingin millum Gomlurætt og Skopun byrjaði í 1993. Hetta var eitt veldugt framstig, ja hetta er tann rætta farleiðin sigur royndi skiparin, sum ikki ber ótta fyri at verða spleysaður av av einum undirsjóvartunnili. -Tað verður so ikki í mínari tíð leggur hann eitt sindur skemtandi aftat.

Tá Eyðun lítur aftur í tíðina, so eru ótrúligar broytingar hendar. Tað var longu eitt øgiligt framstig, tá nýggja Ritan í 71 avloysti ta gomlum, ið sakk í 67. Hon tók fýra bilar. Tveir á dekkið og tveir í lastina. Í 85 byrjaðu vit við Trónda og hann tók 13 bilar. Tá koyrdi man umborð. Nýggi Teistin tekur 33 bilar, og tað skuldi nøktað tørvin eini 20 ár fram, tá hugsað verður um, at tað er avmarkað við fólki Sandoynni.

Sjálvur heldur Eyðun Holm, at sandoyingar eiga at vera nøgdir við skipið. Tað er útgjørt við øllum nútímans hentlekikum og komfort. Har eru góð sitipláss og rúmligt og nosligt. Skipið siglir 13 míl og siglingartíðin verður einar 20 min. Enn hava teir so ikki roynt skipið í øllum veðri, men tað hevur so stabilisatorar. Nú verður eingin bíðitíð og tað er størsta framstigið. Fólk nýtast ikki seta bilin dagin fyri.

## Veldug broyting

Fyri tann 61 ára gamla Eyðun Holm er nýggi Teistin ein veldug broyting í arbeiðinum. Saman við skiparanum á hini vaktini, Høgna Samuelsen, sær hann fram til at fara sigla millum Gomlurætt, Hest og Skopun við nýggja farinum. Enn skulu onkrar ábøtur gerast í Hesti men har verður helst siglandi einaferð í summar. Sjálvur heldur Eyðun, at ikki minst fyri hestfólk verður Teistin eitt veldugt framstig, tí tað kann vera við til at halda lív í oynni. Við føstum sambandi og betri flutningsmøguleikum morgun sum kvøld skuldi hetta verið sera hent hjá hestfólki.

Sum so heldur hann, at Teistin eisini er ein týðandi brikkur í útoyggjamenningini, sum nú verður tosað so nógv um. Hann er so ein ítøkilig broyting til tað betra. Og tá vit spyrja roynda skiparan hjá strandferðsluni, hvat hann heldur um nógva privatiseringstosið, so tykist hann ikki ovurfegin um tað. –Eg haldi ein almenn fyritøka sum Strandferðslan, sum átekur sær ábyrgdina av ferða- og farmafólkaflutningi millum allar oyggjarnar man vera tann besta trygdin hjá útoyggjum, og tí ivist eg eisini stórliga í, hvør privat tímir at sigla uppá Hest og Koltur og onnur smápláss. Best man vera sum er heldur hann fyri og vísir harvið stórt álit á sínum arbeiðsgevara Strandferðsluni, ikki minst nú hon hevur givið teimum hetta nýggja og stásiliga farið til sigling um Skopunar- og Hestfjørð.



*Fleiri tingmenn vóru við til hátíðarhaldið*

*Mynd: Jan Müller*



*Eyðun Holm, skipari her saman við Høgna Samuelsen, starvsfelaga á hini vaktini og enn einum "skipara", á eini aðrari brúgv, nevniliga stjóranum á Strandferðsluni, Reidar Nónfjall*

*Mynd Jan Müller*

gult27 cyan27 magenta27 svart27



Borgarstjórin í Skopun fegnast:

# Størsta tiltakið fyri Sandoynna nakrantíð

**– Hetta má sigast at vera eitt tað størsta tiltakið, sum er gjørt fyri Sandoynna í nýggjari tíð, segði ein bersøgin Gerhard Lognberg, borgarstjóri í Skopun, tá nýggja skipið Teistin fyri fyrstu ferð legði at bryggju í bygdini**

STRANDFARASKIP
*Stefan í Skorini*

Tað var ein ikki sørt errin Gerhard Lognberg, sum stóð fyri Teistanum, tá nýggja stásiliga skipið stevndi um Skopunarfjørð og inn til ferjuleguna. Henda stórhendingin hevði savnað nógv fólk niðri við bryggjuna, sum góvu stórfingna skipinum stórfingna móttøku.

Leingi hevur hann verið á veg, men endiliga gekk sjón fyri søgn. Sandoyingar hava fingið heilt nýtt skip til at røkja týdningar miklastu farleiðina hjá fólki á oynni. Teistin avloysir gamla Trónd, sum nú er vorðin 42 ára gamal og hevur tænt fyri seg. Skipaeftirlitið hevur givið hesum skipi undantaksloyvi nakrar ferðir, so hann framhaldandi kundi røkja siglingina.

## Stór broyting

Gerhard vísti í røðu síni á teir nógvu fyrimunirnar, sum eru við nýggju ferjuni. Fyrst og fremst fer hetta at binda Sandoynna nærri meginøkinum saman við nýggja vegnum, sum verður gjørdur millum Havnina og Gomlurætt.

– Nú verður lættari at sigla ímillum oyggjarnar, og tað yngra fólkið fer óivað at støðast betur úti á bygdunum, legði Gerhard dent á í taluni.

Borgarstjórin vísti eisini á, hvussu skjótt tað hevur gingið, frá tí at skipið varð projekterað til nú, tá skipið er farið í sigling, og tað er gleðiligt.

Gerhard minnist aftur á tíðina, tá gamla Ritan røkti farleiðina til Havnar, og tá hon varð sett í sigling, var tað eisini mett at vera eitt stórt framstig. Eins og tað er við Teistanum.

Áðrenn hetta var siglingin á privatum hondum. Tað var skopuningurin Jákup Andrias Joensen, sum átti og førdi rutubátin Borðoyarnes. Eisini aðrir bátar sigldu so sum Brynhild hjá Kristoffuri Poulsen.

Gerhard vísti í hesum sambandinum á, at Tróndur hevur verið teimum góður, men tíðirnar broytast, og tørvurin skiftir eisini. Tí var alneyðugt við nýggjum skipi nú.




*Gerhard Lognberg saman við soninum frammanfyri nýggja skipinum Teistanum. Gerhard fegnast um nýggja skipið og vísir á teir møguleikar, vinnulívið nú hevur fyri at mennast*

*Mynd: Jan Müller*

## Stuðlar vinnulívinum

Síðani sváru kreppuna, sum rakti Sandoynna serliga meint, hevur vinnulívið ment seg nógv seinastu árini. Í dag eru fleiri fiskavirkir í oynni. Gerhard vísti á, at vinnulívið í oynni fer at hava gott av betraðu samferðsluviðurskiftunum. Sandoy Seafood og Lido Seafood kunnu nú hava frystibingjur standandi í oynni, sum kunnu koyrast umborð á Teistan.

Gerhard nýtti eisini høvið at lýta fram í tíðina:

– Tann næsta broytingin verður kanska, at undirsjóvartunnil verður gjørdur undir Skopunarfjørð, men tað má bíða nakað enn, men helst ikki alt ov leingi, segði borgarstjórin.

At enda takkaði hann landsmyndugleikunum og Skála Skipasmijðu fyri eitt gott arbeiði og ynskti sandoyingum, skúvoyingum og hestfólki hjartaliga tillukku við skipinum.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður:

# Stórt framstig fyri oynna

**Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, gleðist um, at nýggja ferjan fer at betra samferðsluviðurskiftini hjá sandoyingum munandi, og vísti á tørvin við nýggjum skipi, tí miðalaldurin á flotanum nú er vorðin 32 ár**



*Snotiligt er inni í skipinum, sum skal flyta 100.000 ferðandi um Skopunarfjørð árliga*

SAMFERÐSLA
*Stefan í Skorini*

– Kreppan, sum rakti okkum, førdi til íløgusteðg í øllum tí føroyska samfelagnum. Ikki minst Strandfaraskipini vórðu rakt av vánaligu fíggjarstøðuni, og úrslitið hevur verið, at miðalaldurin á skipaflotanum er vorðin 32 ár, segði Bjarni Djurholm í sínari røðu.

Tí er tíðin kom til, at fleiri nýbygningar koma til landið og fara at gera tað liviligari hjá fólk á útoyggjum. Hetta hevur leiðslan á Strandferðsluni eisini gjørt vart við fleiri ferðir, men nú er endiliga eitt nýtt skip at síggja.

Bjarni segði, at tað var eisini gott fyri føroyskt vinnulív, at Skála Skipasmiðja hevði staðið fyri byggingini. Hóast trupulleikar vóru við polsku skipasmiðjuni og seinkingar, hevur Skála Skipasmiðja megnað at fullføra verkætlanina fyrimyndarliga.

## Ikki seinasta verkætlanin

Landsstýrismaðurin við vinnumálum vísti eisini á, at hetta skipið er týðandi liður í arbeiðnum at betra um samferðsluviðurskiftini millum miðstaðarøkið og útoyggjarnar. Aðrar útbyggingar, sum eru tengdar at Teistanum, eru umbyggingar av Skopunar havn og havnini í Hesti og nýggi vegurin millum Havnina og Gomlurætt. Tá hesar verkætlanir verða lidnar, fæst størri nytta úr skipinum, vísir Bjarni Djurholm á.

Í sama viðfangi nevndi hann eisini suðuroyar-ferjuna, sum skal skapa betri trivna í Suðuroynni.

## Framkomið skip

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at henda ferjan er tann fyrsta í danska kongaríkinum, sum er bygd samsvarandi nýggju altjóða krøvunum um bygging at ferjum. Tískil er tað eitt framkomið skip, ið sandoyingar nú hava fingið.

Tað er eisini neyðugt, tí 4.500 einstakir túrar verða gjørdir árliga um Skopunarfjørð, ið verður mett sum opið hav. Árliga verða flutt umleið 100.000 ferðandi og 30.000 akfør. Tí krevur farleiðin eina nýggja og meira tíðarhóskandi ferju.

Reidar vísir á, at fyrireikingin tók eitt ár og átta mánaðir, meðan byggingin tók eitt ár og níggju mánaðir.

Hann leggur afturat, talan er um eitt menningarlop uppá 30 ár, har vit hava innheintað tey tíggju árini og nøkta tørvin tey næstu tjúgu árini.